## Vekttap-avbjóðing – Nú eisini í Føroyum

**Um alt gongur efter ætlan kemur kostráðgevin Gudrun Sigfusson til Føroya at leggja eitt skeið til rættis um sunnan lívsstíl og um at tapa seg.**

Vekttap-avbjóðing – VTA – byrjaði í USA fyri 4 árum síðani. Íblásturin kom úr kendu sjónvarpsrøðini "The Biggest Looser".

Síðani hevur hetta hugskot breitt seg til stórar partar av heiminum, og hevur hjálpt fólki í túsundatali til eitt sunt vekttap, ein sunnari lívsstíl við meiri orku, vælveru og lívsgleði.

Øll kenna til nýggjárslyftini, sum ikki halda rættiliga leingi, sjálvt um ein av álvara ynskir at ansa sær og røkka teimum.

Um ein luttekur í eini avbjóðing í 12 vikur, er møguleikin stórur at røkka á mál. Á skeiðnum bjóða vit upplæring til ein sunnan lívsstíl, kroppsanalysu, persónliga vegleiðing og luttøku í vinarligum kappingum um sunt vekttap, har møguleiki er at vinna kontantan pening.

Vit møtast einaferð um vikuna í ein tíma, har lært verður um sunnan kost, og hvussu ein í gerandisdegnum kann betra um etivanarnar og harvið náa einum sunnum og varandi vekttapi og fáa eitt betri og sunnari lív.

Byrjað verður týskvøldið 4. mai og til ber at tekna seg til ella fáa meiri kunning við at ringja til Kirsten Jacobsen tlf 314175 ella 224175









Selja bilin?
– set hann í Sosialin!

Ring og fá ein prís!



Hevur tú ein bil til sølu, so er Sosialurin rætti miðilin at lýsa í.

Tú kanst lýsa við og uttan mynd.

Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.

Sosialurin
– blaðið øll lesa!

Sosialurin
Postboks 76
FO-110 Tórshavn
post@sosialurin.fo


# Ættarstevna

## verður í Skopun 7. august 2010

**Tað eru eftirkomarar eftir Sámal Petur og Malenu Hentze úr Skopun.**

**Tey fingu børnini:**
Símun Oluf Hentze
Gregor Hentze
Petur Sigurd Hentze
Sommer Lognberg
Mads Winther Hentze (flutti til Norra)
Frants Hentze
Signhild Hentze (flutti til Norra)

Tilmelding fer fram við at gjalda **kr. 350,00 á kontu í Eik nr. 9181 156.802.4** innan 1. juni og viðmerkja navn og hvørjum man er ættaður frá. Farið verður fyrst aftur til oldurabba- og ommubørn.

**Upplýsingar um dagin fáast við at ringja til:**
Fríðhild Winther ...................... Tel. 25 92 35
Jóhanna Sofía Hentze ............ Tel. 36 11 41
Hallmar Winther ..................... Tel. 36 17 29
Gerard Lognberg .................... Tel. 36 13 28
Jón Hentze............................. Tel. 21 63 14
Winnie Kjærbo ....................... Tel. 36 18 10
Poula úr Gørðum .................... Tel. 36 13 23
Eyðfinnur Poulsen ................... Tel. 21 85 60
Maud Báralíð ......................... Tel. 31 03 81

***Vit gleða okkum til dagin saman við tykkum***


Til dansin leygarkvøldið spælir

X-Rays

HAVNAR KLUBBI
Stovna ur 1799

Sosialurin 341800